VIÐMERKINGAR

Brúgvar av svongum orðum

Jóanes Nielsen innstillaður til bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins

Guðrun Gaard

Yrkingasavnið "Brúgvar av svongum orðum", sum er sjeynda yrkingasavnið eftir Jóanes Nielsen, varð herfyri innstillað til Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri 2004.

Heitið á yrkingasavninum sigur frá dreyminum, sum er at skapa samband millum hugans lív og tað livandi lívið. Í yrkingunum syndrast evnislig og tíðarlig mørk. Í fremstu yrkingini í savninum "Onkran morgun" blandast skaldsligi substansurin við hendingar í tíðini og í náttúruni, og skaldið droymir yrkingina sum eina ótarnaða ferð ígjøgnum tíð og rúmd. Knórin í yrkingini er viðurkenningin av, at lívið ber meiningina í sær sjálvum, og tað verður lýst sterkt, sevjumikið og pulserandi. Tíðin parkerar sína kerru her og har á leiðini, og tá

Sólin loysir angan úr villum rósum
Havið gyrðir dagin við skúmandi tonnum

er lívið akkurát, sum tað skal vera. Yrkingin "Náttarljóð" hevur sama flótandi dámin. Har kann ljósið *vigast* á fínum vektum, luftin smakkar av munninum hjá grannakonuni og av starasanginum í trænum, og tú *hoyrir* glæmuna í náttlampuni. Tað deyða er til í tí livandi, tíðin er bert ein og hin sama, tá tað verður sagt, at tey deyðu vera smuglaði inn gjøgnum smáar rivur í lívfrøðini. Yrkingasavnið hevur her dám av tí, at yrkjarin er hugfangaður av holdsliga deyðanum og av ævinleikanum. Hann finnur samljóð og frið í tí at vera partur av eini ringrás, sum er ein ævinleiki. Ikki ein evangeliskur slíkur, men kanska ikki minni guddómligur fyri tað.

Yrkingarnar hjá Jóanesi Nielsen hava dupult lyndi, øðrumegin er ein ógvusligheit og ein trongd til at knúsa allan órætt, hinumegin lýsir eymleiki og inniligleiki út úr yrkingunum. Tað eyðkennir hansara poetiska mál, at tað er trivaligt, litríkt og ofta harðmælt, samstundis sum tað er sjáldsama beinrakið. Í yrkingini "Mítt pass er mín andadráttur", hevur hann eina song og upp í lógvan av vakurleika við sær, tá hann kemur at loysa Jesus niður av krossinum, so hann endiliga kann sleppa at hvíla seg. Pass hansara til Guds er menniskjaligheitin, kærleikin og vakurleikin.

Menniskjaligheitin ber av øllum við sínum mongu formum og útlátum, og tað fullkomna er bert til í viðurkenningini av tí ófullkomna sum fyritreyt fyri tí. Einki er so lukkuligt sum ein ófyrireikað veitsla, og tað er betri at hoyra til teirra, ið støðugt leita eftir svarum enn at vera millum teirra, sum halda seg hava funnið svarini og goyma tey aftanfyri skottrygt glas.

Jóanes Nielsen uppfyllir við hesum yrkingasavninum djúpasta og týdningarmesta endamálið sum yrkingar hava, tá ið hann við møtinum millum subjektivt og surrealistiskt skaldsligt mál og veruleikan vekir ella endurvekir ta sterku lívskensluna.

Yrkingasøvn eftir Jóanes Nielsen verða eisini týdd til onnur mál og júst fyri fáum døgum síðani kom næstseinasta savn hansara "Pentur" út á nýnorskum, har tað eitur "Sting". Tað er Lars Moa, sum hevur týtt og bókin er útgivin á forlagnum Orkana. Sami týðarin hevur eisini longu týtt "Brúgvar av svongum orðum", sum á nýnorskum eitur "Bruer av svoltne ord", og tað savnið kemur ætlandi út á Det Norske Samlaget í næstum.

Roknistykki fyri 1. skúlaflokk – ella onki er nýtt undir sólini

Edmund Joensen

Frá einum halli uppá 400 milliónum á landskassaroknskapinum til eitt yvirskot uppá 550 miljónir kr., tað gevur ein mun uppá 950 miljónir kr. **rætta** vegin. Hetta var útslitið hjá Sambands-landsstýrinum 1994 til 1998.

Frá einum yvirskoti uppá 550 miljónum til eitt undirskot uppá 300 miljónir kr. gevur ein mun uppá 850 miljónir kr. **skeiva** vegin. Hetta var úrslitið hjá Fullveldislands-stýrinum frá 1998 til 2003.

Allir næmingar í fyrsta skúlaflokki kunnu vátta at hetta er rætt. Allir tilkomnir føroyingar kunnu vátta at hetta er onki nýtt. Seinastu 50 árini hava Føroyar upplivað eina røð av kreppum. Allar eru nær tengdar so ella so at fullveldismonnum. Hvørja ferð føroyski veljarin hevur latið fullveldismenn koma framat landskassanum, so gekk galið.

Lat okkum lata seinastu turru almennu roknskapartølini tala?

Alt bendir á, at handalagið hjá føroyskum fullveldismonnum gerst verri og verri. Tað er ótrúligt men satt. Tí ongantíð í Føroya søgu hava politiskir samgonguflokkar havt so gott útgangsstøði, og ongantíð í søguni hava Føroyar havt so góðar fíggjarligar umstøður sum tey seinastu 6 árini (fiskanøgdir, fiskaprísir, orkuprísir, rentustøði o.s.fr.).

Bæði næmingarnir í fyrsta flokki og allir tilkomnir føroyingar hava tey seinastu árini hoyrt fullveldismenn reypað ófført av fíggjarligu framgongdini í Føroyum. Milliardirnar hópaðu seg upp, og flutu yvir í landsbankan.

Næmingarnir í fyrsta flokki hava neyvan lisið Hvítu bók. Høvdu teir tað, høvdu teir ivaleyst kravt eina frágreiðing frá flokslæraranum. Hvussu kann munurin millum Hvítu bók og upplýsingarnar annars frá føroyskum fullveldismonnum og fjølmiðlum liggja so langt frá veruleikanum?

Men hvat sigur tilkomni- og at sær komni, føroyingurin? Kennir hann seg ikki eina ferð enn førdan "bak ljósið" av okkara fullveldismonnum?

Læt meg fyri góðan ordan skyld minna á, at sambandslandsstýrini og fullveldislandsstýrini hava arbeitt undir somu samfelagsskipanum, føroysku heimastýrisskipanini. Tað er sostatt ikki skipanin sum ger munin, heldur ikki danir. Teimum hava vit livað saman við í hundrað tals ár.

Munurin er sólkaklárur. Sambandsflokkurin annan vegin og rætta vegin, og fullveldismenn hin vegin og skeiva. Tað áttu ikki bert næmingarnir í fyrst flokki, men allir tilkomnir føroyingar at tikið til eftirtektar.



Tølini í talvuni omanfyri eru almen roknskapartøl fram til 2002. Undirskotið á fíggjarlógini fyri 2004 byggir á meting, gjørd eftir fíggjarlógarviðgerðina í heyst

Bill og fýrverk í úrtíð

Kristian Magnussen
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin



Í Sosialinum týsdagin spyr Bill Justinussen, hvat feilar Kristian Magnussen? Orsøkin er, at eg í grein í Sosialinum leygardagin m. a. føri fram at »Hóast vit hava havt stóra búskaparliga framgongd seinastu árini, eru ikki stórvegis ábøtur gjørdar innan almanna- og heilsuøkið og skúlaverkið«.

Bill følir seg kallaðan til at afturvísa tí, eg føri fram, og hetta heldur hann seg gera við nøkrum dømum, hóast dømini fyri tað mesta eru leysar ætlanir og fýrverk í úrtíð.

Eitt av hansara páhaldum er, at stór framstig eru hend í sjúkrahúsverkinum. Hann nevnir nýggja bygningin og viðlíkahald annars á Landssjúkrahúsinum. Viðv. nýggja bygninginum er at siga, at hesin bleiv samtyktur at byggja í 97 av landsstýrinum, ið sat til valið í 98, og teir fyrstu pengarnir vóru settir av á fíggjarlógini fyri 98.

Høvdu hesi bæði seinastu landsstýrini fylgt byggiætlanini hjá bygginevndini, so hevði bygningurin longu verið tikin í nýtslu og umbygging og viðlíkahald á landssjúkrahúsinum byrjað.

Serviðgerð uttanlands

Bill gloymir at nevna, at hann er fyrsti landsstýrismaður í Føroya søgu, ið noktar fólki sjúkraviðgerð uttanlands, og hann gloymir eisini at nevna, at hann eisini hevur gjørt kunngerðina frá 97 um flutnings- og ferðaendurgjald til sjúklingar uttanlands meiri ómenniskjaliga.

Fólkaheilsa og mjólkaprísir

At Bill nevnir fólkaheilsuna vísir, at hann er í so kaldur. Tað einasta ítøkiliga, sum er hent á tí økinum í Bill'sa tíð er, at mjólkin er vorin dýrari, og at hon frá á nýggárinum fór at gerast enn dýrari, um Bill bleiv sitandi. Bill nevnir eisini, at hann fer at nema við familjupolitikkin í aðrari grein. Eg vóni, at hann eisini tá minnist til at greiða frá síni familjupolitisku ætlan, at lækka rentufrádráttin hjá barnafamiljum og øðrum húsarhaldum.

Hvat ið er fupp ella fakta hjá Bill vita tey, ið eru rakt av avleiðingunum av hansara politisku avgerðum.

Ynskir veljarin ein meiri menniskjaligan og álítandi heilsupolitikk, so vil Javnaðarflokkurin, um vit fáa neyðugu styrkina og koma í samgongu aftan á løgtingsvalið, føra ein ítøkiligan politikk, heldur enn áhaldandi fuppið frá Bill og samgonguflokkunum, ið hava havt valdið síðan 98.

NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Stýrimanspróvtøka fyri 30 árum síðan

Á Føroya Sjómansskúla tóku 14 mans prógv sum stýrimenn í desember 1973.

Teir vóru: Aftara rað f.v.: Dánial Joensen, Oyndarfjørður, Eyjohn Sivertsen, Klaksvík, Hans M. Joensen, Vágur, Bergleif Jacobsen (nú Brimvík), Syðrugøta, Vilmund Sørensen, Húsavík, Niels Jacob Michelsen, Tvøroyri, Rúni Hentze, Argir, og Sámal í Homrum, Kollafjørður.

Fremra rað, f.v. Hanus Heinesen, Toftir, Eiler Mikkelsen, Toftir, Mikkjal Olsen, Klaksvík, Jóannes Skaale, Tórshavn, Ebbe Michelsen, Tvøroyri, og Óli Djurhuus, Hósvík.

Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1974

Flogsøgan 100 ár

17. desember vóru liðin 100 ár, síðan fyrsta flogfar við motori fór á flog. Tað vóru brøðurnir Wright í Kitty Hawk í North Carolina, sum gjørdu hesa royndina.

Teir gjørdu fýra royndir hendan dagin, tann 17. desember 1903, fyrsta túrin flugu teir 37 metrar í 12 sekund. 37 metrar er umleið helvtin av longdini á einum Boeing 747 ferðafólkaflogfari.



Flogfarið hjá brøðrunum Wright í North Carolina sum fyrstu ferð fleyg tann 17. desember 1903

Mynd: FLIGHT 100 years of aviation

Dagurin

18. desember. Gratianus, deyður umleið ár 300. Biskupur í Tours í Fraklandi. Varð tikin av døgum, tá ið Diocletianus ráddi.

Ole Olsen:

25 ár síðan heimsmeistarin í speedway vitjaði

12. desember 1978 kom kendi danski heimsmeistarin í speedway, Ole Olsen, til Havnar á vitjan.

Endamálið við vitjanini var at gera reklamu fyri væl kenda sodavatnið Soda-streem. Soda-streem fyritøkan var sponsorur fyri Ole Olsen. Nógv børn vóru samankomin fyri at heilsa upp á heimsmeistaran og fáa hansara autograf saman við eini litplakat

Kelda: Myndaárbókin, árið ið fór 1979

SETHÚSAMARKNAÐURIN

Sel húsini í Sosialinum og á www.portal.fo

Ring og tosa við Duritu á telefon 341 852 ella teldu-post: durita@sosialurin.fo

SETHÚSAMARKNAÐURIN